SVIMJISAMBAND FØROYA
Faroe Islands Aquatics Federation
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Úttøkuskipan til NJM/NM 2026 í Vilnius

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til Norðurlendsku Meistarastevnuna og JuniorMeistarastevnuna, sum verður í Vilnius í Litava í døgunum 4.-6. Des. 2026

Uppá tal eru tey av hesum sum í kravtíðarskeiðnum klárað avrik yvir ásettu AQUA-stig (2026) á stuttgeil (25m):

- Yngri juniorar (fødd í 2011-2013): 625 AQUA-stig
- Eldri juniorar (fødd í 2009-2010): 650 AQUA-stig
- Seniorar (fødd í 2008 ella fyrr): 675 AQUA-stig

Sí AQUA 2026 talvurnar her:
- Kvinnur: https://resources.fina.org/fina/document/2026/09/05/38f8e66d-8c33-45cc-a39c-150bbe69f43d/World-Aquatics-Points-SCM_2026_Female.pdf
- Menn: https://resources.fina.org/fina/document/2026/09/05/eb72585f-25af-4ac7-b052-d72a3d51ddf0/World-Aquatics-Points-SCM_2026_Male.pdf

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar, sum lýst í úttøkuskipanini til eyka úttøkur: https://ssf.fo/kapping/uttokuskipan-til-eyka-uttokur/

Kravtíðarskeiðið er frá NM/NJM 2025 til og við Ægir Open 1. nov. 2026

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. september 2026, og at velja luttøku frá um serligar umstøður tala fyri hesum.

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Feløgini verða hartil biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir viðkomandi svimjarar ið *ikki* ynskja úttøku, í seinasta lagi tá ið Ægir Open 1 nov er liðugt.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu
Starvsnevnd SSF